## Tíma ikki at vera veiðimenn

Tey ungu í Grønlandi hava lítlan hug at taka við sum veiði- ella fiskimenn, sigur KNR. Orsøkin er, at veiðimannalívið er heldur baldrut, og minkandi kvotur og fellandi prísir økja ikki áhugan hjá tí yngra ættarliðinum at ganga í fedranna fótasporum. Qaerngaq Nielsen, sum hevur verið veiðimaður alt sítt lív, sigur við grønlendska kringvarpið, at tá Men í dag ræður hann nsínum abbabørnum frá at fara somu leið, tí framtíðin er alt ov ótrygg, sigur hann við KNR.



# Pensjónsreformur er ikki fyri pensjónistar

**Tá nýggi pensjónsreformurin veruliga fer at gera mun, er lítil møguleiki fyri, at hann kemur at ávirka pensjónistarnar í dag. – Hetta eigur at áhuga yngri fólk og ikki pensjónistarnar so nógv, sigur Kári Petersen, sum er í arbeiðsbólkinum, ið arbeiðir við pensjónsreforminum**

PENSJÓNIR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*



*Kári Petersen, búskaparfrøðingur, greiðir frá, at vit eru noydd at gera ein pensjónsreform, fyri at sleppa undan einum ógviliga stórum skattatrýstið*

Ætlanin er, at pensjónsreformurin skal setast í verk um heilt stutta tíð, men tað vísir seg, at hann ikki veruliga hevur nakra ávirkan fyrr enn um nøkur ár.

- Tað vísir seg, at eldri fólk hava størsta áhugan fyri pensjónsreforminum, men hann kemur at ávirka fólk, ið eru ung nógv meira enn tey eldru. Vit tað fer til dømis ikki at ávirka tey, ið hava verið hørm um, at pensjónsaldurin fer at hækka. Heldur verða tað yngru fólkini, ið fara at arbeiða longri. Hinvegin er tað eisini soleiðis, at tá vit løgdu uppskotið fram fyri fakfeløgunum, so vísti tað seg ikki veruliga, at hetta uppskotið við at hækka pensjónsaldurin órógvarði teg so nógv, sigur Kári Petersen.

### Langtíðarloysn

Verður hesin pensjónsreformurin settur í verk, so er talan um eina loysn, ið kemur at merkja, at mann løggevur eini 40 ár fram í tíðina. Kári Petersen heldur tó uppá, at hetta ikki verður nakað politkararnir eru bangnir fyri.

- Hesin reformurin er nakað mann er noyddur at gera. Verður onki gjørt, so verður skatturin so høgur, at fólk fara at flyta av landinum og enn færri skattgjaldarar verða. Orsøkin til, at vit mugu gera hesar grundleggjandi broytingarnar er, at vit mugu hava eina pensjónsskipan, sum kann vera nøktandi, samstundis sum hon ikki skapar ein ov stóra byrðu á samfelagið, vísir Kári Petersen á.

Sambært framrokningum verða tað í 2050 eini 13.000 fólk yvir 65 ára aldur í Føroyum, í mun til eini 7.000 í dag.

# Vit skulu verja skiftistíðina

**Formaðurin í Føroya Pensjónistafelagið er sannførdur um, at pensjónsreformurin er eitt gott hugskot, men hann metir hinvegin at pensjónistafelagið má verja í yvirgangstíðini**

PENSJÓNIR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Onkur undrast, hví Føroya Pensjónistafelag var umboðað á einum kjakfundi, har ein reformur verður umtalaður, har endaliga úrslitið ikki ávirkar pensjónistarnar í dag. Hetta hevur Sigvald Kristiansen, formaður, eina greiða meining um.

- Vit mugu verja okkum í broytingartíðini. Tað ber ikki til, at vit skulu missa pening, og tí mugu vit syrgja fyri at verja okkara eldru í hesi broytingartíðini, ið fer at koma, sigur Sigvald Kristiansen. Verður ongin yvirgangstíð, har ein tillaging verður gjørd, so merkir hetta, at pensjónistarnir í dag fáa minni í pensjón, enn tey fáa í løtuni.

Jóannes Eidesgaard, fíggjarmálaráðharri tekur undir við pensjónistafelagnum, at broytingartíðin verður tað tyngsta.

- Tað er altíð soleiðis, at tá mann ger broytingar, so er tíðin, tá broytingarnar henda tað tyngsta. Hetta hava vit sæð fleiri ferðir áður, sigur Jóannes Eidesgaard.

### Vit eru einstaklingar

Eisini vísir Føroya Pensjónistafelag á, at tey halda tað vera óheppið, at tað er ein vansi at vera giftur, tá talan er um pensjónir.

- Vit gjalda øll skatt sum einstaklingar, og tað mesta av samfelagnum er innrættað til einstaklingar. Tí halda vit tað vera óheppið, at gift fólk skulu fáa minni pensjón og verða revsaði av giftarmálinum, um annar parturin velur at arbeiða, staðfestir Sigvald Kristiansen. Sambært upprunaliga útkastinum hjá arbeiðsbólkinum skuldi hetta ikki broytast, men í uppskotinum, sum tað fyriliggur nú, so verður tað soleiðis, at pensjónistar verða mettir sum einstaklingar, og ikki sum nú, har eitt gift par verður mett at vera ein eind.



*Sigvald Kristiansen, formaður í Føroya Pensjónistafelagið, metir, at ein týdningarmikil partur av pensjónsreforminum verður at syrgja fyri, at eldri fólk, ið eru gift, verða mett at vera einstaklingar*